# Lívligt krimi-kvøld á Hvonn



Lisa Marklund og Jo Nesbø prátaðui um norðurlendskar krimi-bøkur

**Tað gekk lívliga fyri seg í Rás2-sendingini Hvonn Live í gjárkvøldið. Svenska krimi-drotningin gav føroyskum kvinnum ein uppsang og bað tær standa saman. Norski krimi-rithøvundin hótti við at brúka føroyingar í einari nýggja krimi. Og útvarpsmaðurin Elis Poulsen helt, at tað var stóru heiður at verða boðin á Rás2 at tosa um eina sending hjá sær**

HVONN LIVE
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið var seinasta Hvonn Live sendingin fyri summarsteðgin. Sendingarnar eru ein røð, sum Rás2 framleiðir og sendir beinleiðis av Hovnn í Havn.

Hesaferð vóru tveir kendir norðurlendskir krimi-rithøvundar komnir á vitjan. Liza Marklund úr Svøríki og Jo Nesbø úr Noregi greiddu frá sínum arbeiði við krimi-søgum.

Liza Marklund er eisini kend fyri at hava meiningar um leiklutin hjá kvinnum í samfelagnum, og hon helt, at í Føroyum mátti okkurt gerast.

- Eg sigi bara stakkals Føroyar, hetta er sum at koma aftur í 50'ini. Tit hava eina ekstrema undirumboðan av kvinnum í politikki, og tað mugu tit kvinnur gera nakað við. Tit kvinnur mugu standa saman og hjálpa hvørjum øðrum. Tað eru bara tit, sum kunnu broyta støðuna, eingin ger tað fyri tykkum, segði Liza Marklund.

Og so var klappað millum mongu áhoyrararnar á Hvonn.

## Skrivar allastaðni

Norðmaðurin Jo Nesbø varð 10 tímar seinkaður til Føroya fyrradagin, men hann spilti ikki tíðina burtur. Hann greddi frá, at han hevði sitið á flogvøllinum í Kastrup og skriva nýggju krimi-søguna hjá sær.

- Og eg havi eisini skrivað her í Havn í dag. Eg royni at skriva hvønn dag, og fyri meg er tað eingin trupulleiki at skriva á einum flogvølli ella mitt í einum fremmandum býi. Tað dámar mær næstan betur enn at sita heima, segði Jo Nesbø.

Og hann helt, at Føroyar og føroyingar kundu enda í onkrar krimi hjá honum í framtíðini.

- Eg fái íblástur allastaðni, har eg ferðist. Og tað kann verða,a t Føroyar ella onkur føroyingar, sum eg havi hitt, endar í onkrari krimi hjá mær, segði Jo Nesbø

## Heiður á Rás2

Útvarpsmaðurin Elis Poulsen, sum er landskendur fyri sínar løttu dansisendingar, legði eisini leiðina fram við á Hvonn, og hann greiddi frá, hvussu hann arbeiðir við sínum sendingum, og hvønn respons hann fær frá sínum lurtarum.

- Og eg má siga, at tann størsti heiðurin, sum mann kann fáa, er at verða boðin á Rás2 at tosa um eina sending, sum eg geri í útvarpinum, segði væl upplagdi Elis Poulsen.

Livandi tónleik fingu áhoyrararnir við Hanusi G. Johansen og Jógvani Andriasi Joensen, og eisini sang ársins songrødd í ár, Birita Poulsen úr Vestmanna.



Sonne Smith heilsar upp á Jo Nesbø